ÍF-SÍ 3-0 (25-22, 25-16, 25-18):

# ÍF tekur greipuna

**Tað var bara í fyrsta settinum, at SÍ mutaði nakað ímóti, tá teir sunnudagin vitjaðu á kambsdali í eitt slag av upptakt til steypafinaluna**

MANSFLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað varð sagt undan dystinum millum ÍF og SÍ, at hetta var eitt slag av undanframførslu til steypafinalurnar í flogbólti, har bæði liðini skulu spæla ímóti hvørjum øðrum.

Og skal metast eftir dystinum sunnudagin, so er eingin sum helst ivi um, at fuglfirðingar ætla sær at vinna alt tað, sum er at vinna í ár. Verur sæð burtur frá fyrsta settinum ella har á leið, so var nevnliga ongan tíð nakar ivi um, hvat liðið var hitt sterkara sunnudagin. Snøgt sagt, so spældu fuglfirðingar sum teimum lysti, og tó at sørvingarnir stríddust, so tóktist hetta ikki at muna tað allar minsta móti væl upplagda heimaliðnum, sum alla tíðina megnaði at leggja trýst á.

Sum sagt, so mundi tað einamest vera sum upptakt til steypakappingina, at dysturin hevði áhuga. Sjálvandi var talan eisini um dyst millum tey bæði liðini, sum liggja ovast á stigatalvuni, men her munurin longu nú somikið stórur, at tað skal nakað væl meira enn eitt undur til, um nakað av hinum liðunum skal gera sær vónir um at taka ÍF aftur.



*ÍF hevur í løtuni nógv tað sterkasta mansliðið í føroysku flogbóltskappingini, og hetta varð undirstrikað, tá teir sunnudagin sendu sørvingar tómhentar heimaftur*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Trý niðureftir

**Føroyar eru nú nummar 116 á altjóða styrkislistanum hjá FIFA**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Á hvørjum mánaði letur altjóða fótbóltssamgongan, FIFA, ein nýggjan styrkislista úr hondum, har tær 204 limatjóðirnar verða styrkismettar. Styrkismetingin er grundað á, hvussu liðini hava staðið seg seinnu árini, soleiðis at dentur eisini verður lagdur á, hvat slag av dysti talan er um, eins og styrkin hjá mótstøðuliðinum verður havd í huga.

Januar mánaður er vanliga ein sera friðarligur mánaður viðvíkjandi landsdystum, og tí eru broytingarnar á listanum sera fáar hesaferð, men tó so. Onkrar eru.

Tó at Føroyar ongan dyst hava spælt, síðani tepra tapið ímóti fjórðsterkastu tjóðini á listanum, Týsklandi, so eru vit hesa ferð farin trý pláss niður á listanum. Hetta tí Singapore, Libanon og Maleisia øll hava gjørt rættilig skarvslop á listanum.

Annars er Danmark sambært styrkismetingini framvegis nógv tann sterkasta norðulendska tjóðin. Ofta hava Noreg og Svøríki eisini ligið sera frammarliga í hesum, men seinastu mánaðirnar eru tey bæði dottin hampuliga langt niður á listanum.

Vert er eisini at bíta merki í, at øll Skotland, Ísland og Litava, sum øll skulu spæla móti Føroyum í ár, øll gingu aftur á listanum, sum vit partvíst hava endurgivið niðanfyri. Tølini í klombrum sýna, hvussu liðini vórðu styrkismett fyri inum mánaði síðani.

| nummar | land |
|---|---|
| 1 (1) | Brasil |
| 2 (2) | Frakland |
| 3 (3) | Spania |
| 4 (4) | Týskland |
| 5 (5) | Argentina |
| 6 (6) | Holland |
| 7 (9) | Turkaland |
| 8 (7) | Ongland |
| 9 (8) | Mexico |
| 10 (10) | USA |
| 12 (12) | Danmark |
| 24 (24) | Svøríki |
| 25 (26) | Noreg |
| 43 (43) | Finnland |
| 60 (58) | Skotland |
| 61 (58) | Ísland |
| 80 (78) | Litava |
| 116 (113) | Føroyar |

ÍF-Dráttur 3-1 (25-19, 22-25, 25-10, 25-22)

# ÍF heldur fast

**Tó at Dráttur togaði eitt sindur ímóti, so helt ÍF fast um oddasessin**

KVINNUFLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Dráttur hevur í ár argað ÍF eina einstaka ferð, tá tær vunnu heimadystin í grundspælinum. Tí vóru tær úr Fuglafirði ávaraðar, tá tær sunnudagin enn eina ferð skuldu taka ímóti Drátti, og hesaferð kiksaði tað ikki hjá oddaliðnum.

Tó so, so togaði Dráttur eitt sindur ímóti . Eftir at ÍF hevði vunnið fyrsta settið so toluliga sannførandi, var tað brádliga Dráttur, sum tók sær av næsta settinum. Kanska gav hetta eisini Drátti trúnna uppá, at tað skuldi verða gjørligt at basa oddaliðnum einaferð enn, men vóru slíkar vónir til, so vórðu tær so dyggiliga gjørdar til einkis. ÍF setti nevnliga fulla ferð á í tríðja settinum, sum varð vunnið uttan stórvegis roks, og at Dráttur so enn einaferð royndi at muta eitt sindur ímóti seinasta settið, fekk minni týdning.

Við sigrinum helt ÍF sjálvandi fyrst og fremst fast um oddasessin, og tað var sjálvandi tað, sum dagurin fyrst og fremst snúi seg um. Hinvegin er einki at ivast í, at tað frøddi ÍF almikið, at TB samtundis snávaði í Klaksvík. Hetta inniber nevnliga, at ÍF nú hevur ein part minni at stríðast við í oddinum, har talan annars hevur verið um trý lið største partin av árinum. Og samstundis er greitt, at vit um tvær vikur fáa ein veruligan lykladyst í gullstríðnu, tá ÍF vitjar í Klaksvík. Megnar ÍF tá at endurtaka sigurin frá Mjølnir kappingini, liggja tær meira enn væl fyri at vinna fyrsta meistaraheitið hjá kvinnunum.

# Holte kom í gongd

**Eftir tapið seinasta vikuskiftið var kravið hesaferð ein sigur, tá Holte á útivølli spældi móti Marienloyst Volley**

FLOGBÓLTSÚTISETI
*Jákup Mørk*

Fyri Bárð Mikkelsen mundi tað kennast nakað serligt, nú teir í Holte á útivølli skuldu royna seg móti Marienlyst, sum er fyrrverandi felagið hjá Holte.

Eftir at teir beint fyri jól vunnu steypafinaluna, kom Holte nevnliga niður aftur á jørðina, tá teir í einum sera spennandi dysti máttu lúta fyri Arhus seinasta vikuskifti, og tí var alneyðugt við einum sigri á Marienlyst um vikuskiftið.

Og hetta var eingin løtt uppgáva. Marienlyst var nevnliga liðið, sum endaði ovast í grundspælinum, sum annars verður mett sum hitt javnasta í danskari flogbóltssøgu.

Fyrstu løtuna av dystinum var annars líkt til, at talan ikki skuldi gerast um serliga trupulleikar hjá Holte. Tó at Marienlyst var væl við, so vann Holte nevnliga tey bæði fyrstu settini, men so tók heimaliðið brádliga yvir. Teir vunnu tey bæði næstu settini hampuliga sannførandi, so tá farið varð undir avgerandi javnbrótaran stóð hampuliga nógv á hjá Holte. Seinastu dystirnir hava tó helst lært teir nakað um, hvussu nervarnir skulu stýrast í spentu støðunum, og tað eydnaðist eisini at vinna fimta settið.

Enn eru bert tveir dystir leiktir í danska elitu-endaspælinum, og tí er sjálvandi ilt at meta um, hvønn týdning sigurin fær fyri teir í Holte, tá alt verður gjørt upp, men fyribils ber í øllum førum til at staðfesta, at felagið er við í kappingini.



Mjølnir-TB 3-1 (25-22, 20-25, 25-13, 25-14):

# TB tykist fáa tað tungt



*Tað var fyrst og fremst við einum væl virkandi verjuparti, at Mjølnir fekk takið á TB, og nú tykist FM-dysturin at gerast eitt stríð millum Klaksvíkina og Fuglafjørð*

**Hóast tað enn eru sjey dystir eftir at leika, so er nú líkt til, at meistararnir úr TB fáa sera tungt við at verja heitið**

KVINNUFLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tey bæði næstfremstu liðini í meistaradeildini hjá kvinnum, Mjølnir og TB, mundu bæði vita, at talan var um eitt slag av lagnudysti, tá tey hittust sunnudagin. Undan dystinum vóru bæði liðini í hølunum á ÍF, sum fyri fyrst hevur lagt seg á odda, og tí var mest sum alt avgerandi, at eitt gott úrslit spurdist burtur úr dystinum.

Tí mundi tað eisini koma sera illa við hjá TB, at avloysaraskipið til suðuroyarsiglingina, St. Ola, fekk skaða longu á fyrsta túrinum. Hetta merkti eina seinkaða fráferð norðureftir, og úrslitið gjørdist, at TB liðið ikki var í Klaksvík fyrr enn ein tíma undan dystarbyrjan, og tað í sjálvum sær er ikki meira enn næstbest.

## Mjølnir riggaði

Tað skal tó einki takast frá Mjølni av teirri orsøk, tí sum skilst úr Klaksvík, so var talan um ein hin besta dystin, sum Mjølnir hava leikt í ár.

Ikki minst riggaði verjuparturin av liðnum sera væl, soleiðis at annars álopssterku TB-leikararnir ongan tíð komu til sín rætt, og ikki minst var hetta tungur biti sálarliga hjá TB, sum gjørdust alt meira mótfalnar, sum dysturin leið.

Tey bæði fyrstu settini hevði annars leikað rættiliga javnt á, men tá Mjølnir so fekk veruliga takið á TB, varð skarvurin mest sum givin yvir.

Og einki er at ivast í, sigurin á TB hevur givið klaksvíkingunum vón um, at tað kanska fer at bera til hjá teimum í ár. Sum kunnugt eydnaðist tað ikki hjá liðnum at vinna seg fram í steypafinaluna, men enn er FM-møguleikin opin. Hvussu stuttur ella langur vegurin til hetta er, fæst ivaleyst at vita um tvær vikur. Tá kemur ÍF á vitjan, og sum støðan er í løtuni, er einki at ivast í, at hetta verður ein av avgjørdu lykladystunum í samlaðu uppgerðini a stigatalvuni.


**Fráboðan um umhvørvisgóðkenning**

Við hesum verður gjørt kunnugt, at Heilsufrøðiliga starvsstovan tann 20. januar 2003, við heimild í grein 26 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd og kunngerð nr. 54 , grein 1, stk. 4, hevur góðkent:

**Kryvjivirkið hjá P/F Vestsalmon í Kollafirði**

Góðkenningin liggur alment frammi á Heilsufrøðiligu starvsstovuni. Avgerðin kann kærast til Landsstýrismannin í umhvørvismálum. Møgulig kæra skal sendast Heilsufrøðiligu starvsstovuni, Falkavegur 6, 2. hædd, FO-100 Tórshavn, í seinasta lagi fýra vikur frá dags dato.

Góðkenningin kann somuleiðis síggjast á heimasíðuni hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni, www.hfs.fo

**Heilsufrøðiliga starvsstovan**


Fram-Fleyr 3-0 (25-11, 25-15, 25-14):

# Tannleys lokaluppgerð

**Fram hevði ikki stórvegis trupulleikar av at vinna grannauppgerðina um vikuskiftið**

MANSFLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað er einki at ivast í, at árið í ár bert er eitt av teimum hjá Fleyr, sum skjótast gjørligt skulu í gloymibókina. Eitt er, at felagið undan árinum hevði gjørt av, at nú skuldi eitt nýtt lið spælast saman, og at felagið tí ikki hevði arbeitt við at fáa nakran serligan styrk til felagið.

Hinvegin er tað samstundis ein sannroynd, at øll hini feløgini í deildini hava roynt at styrkt sær um hópin, og tað hevur merkt, at gloppið frá Fleyr og so til hini er vorðið óvanliga stórt.

Spenningur hevur mest sum ikki verið í nøkrum einstøkum setti hjálinum, og soleðis var eisini sunnudagin, tá grannauppgerðin móti Fram stóð á skránni.

Hóast Fram hendan dagin hevði trupulleikar av at manna liðið, tá fleiri leikarar høvdu forfall, so kom ongan tíð upp á tal at geva nakað sum helst frá sær í dystinum. Uttan stórvegis hóvasták vórðu tey trý settini fingin til høldar, og eftir eitt vikuskiftið av tí meira friðarliga slagnum kunnu teir í Fram nú gera seg til at taka ímóti ÍF komandi vikuskifti. Og einki er at ivast í, at tað verður ein heilt annar dystur.

# Nýtt gólv til flogbóltin

**Sonevnt taraflex-undirlag verður lagt á gólvið í Ítróttarhøllini á Hálsi, tá steypafinalunar í flogbólti verða á skránni**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Síðani flogbólturin fyri trimum árum síðani fekk sína egnu steypakapping, hevur hetta í nógvar mátar verið mett sum eitt slag av flaggskipi hjá flogbóltinum. Finaludystirnir hava verið varpaðir beinleiðis í bæði út- og sjónvarpi, og yvir høvur hevur tað hepnast sera væl at draga áskoðararnar hjá ymsu feløgum við, soleiðis at talan mest sum altíð hevur verið um fullsetta høll.

Og tað tykist eisini so, at tað alla tíðina verður arbeitt miðvíst við at gera karmarnir kring finaludystirnar enn betri. Eitt nú hevur talan á hvørjum ári verið um altjóða dómara, sum er komin higar at døma finaludystirnar.

Og árið í ár er so einki undantak í so máta. Tað hevur longu verið nevnt, at ætlanin er at seta stórskíggja upp í høllini, soleiðis at áskoðararnir fáa fylgt enn betri við dystinum, og nú er so enn eitt stig tikið rætta vegin. Flogbóltssambandið hevur nevnliga gjørt av, at finaludystirnir í ár skulu spælast á sokallaðum taraflexc-gólvið, sum vanliga verður nýtt til allar stórar kappingar uttanlands.


**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr.** P/F 549, P/F Hvilvtenni, 520 Leirvík.

Felagið er samanlagt við skrásetingar-nr. P/F 2485, P/F Kjartan Joensen,sum samstundis verður strikað.

*Skráseting Føroya tann 17. januar 2003*

*Kristin Balle*

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr.** P/F 2485, P/F Kjartan Joensen, 520 Leirvík.

**Navn:** P/F Kjartan Joensen
**Adressa:** 520 Leirvík
Felagið er strikað eftir samanlegging við skrásetingar-nr. P/F 549, P/F Hvílvtenni.

*Skráseting Føroya tann 17. januar 2003*

*Kristin Balle*